

## Broytingar hjá starvsfólki

Eitt av starvsfólkunum á posthúsinum á Óðinshædd hendan morgunin, var Ella Reinert. – Eg eri spent uppá at fólk fara at brúka posttøkuna. Hetta er eitt stig móti tí, at fólk, í ein størri og størri mun avgreiða seg sjálvi, segði hon. Tó legði hon afturat, at nógv mugu koma í venjing við hesum tóli, áðrenn tað verður veruliga gangnýtt til fulnar. Fyrstu tíðina verður tað óivað so, at fleiri starvsfólk inni á posthúsinum verða noydd at hjálpa kundum, sum royna posttøkuna fyri fyrstu ferð. Men hetta er eisini ætlanin, starvsfólkini eru ikki ókunnug við posttøkuna, tey eru væl og virðiliga upplærd at nýta hana.

# Postverk Føroya í koll-veltandi menning

**Fyri einum ári síðan fór Postverk Føroya í gongd við at menna og fáa eina skipan, sum skuldi gera tað gjørligt hjá kundum sjálvir at avgreiða síni ørindi á posthúsinum. Nú er skipanin komin og sett í verk. Fyrst á posthúsinum á Óðinshædd. Fyriskipararnir eru sera spentir um framtíðina hjá postverkinum**

POSTUR

*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*




*Eiler Haraldsen er 25 ár og arbeiðir á Formula. Hann var fyrsti persónur at royna nýggju posttøkuna*

Í morgun klokkan 9 læt fyrsta posttøkan upp. Nýggja skipanin ger tað gjørligt hjá kundum at avgreiða summi av sínum ørindum, uttan at fara inn á posthúsið. Til ber at senda pakkar og brøv, keypa frímerki og brøv og annað. Posttøkan, ið tólið nevnist, hevur verið ávegis í eitt ár. Hetta er næsta stigið, fyri at nútímansgera postverkið og somuleiðis veita kundum betri tænastu, søgdu fyriskipararnir.

Avgreiðslan fer fram við ein telduskíggja, har vegleiðing fæst til so at siga alt. Rindað verður við einum vanligum gjaldskorti. Eftir avgreiðslu verður pakkin ella brævið lagt í eina bingju, ið er í posttøkuni.

Eins og bankarnir fyri nøkrum árum síðan fluttu meginpartin av avgreiðsluni yvir á sjálvtøkurnar, soleiðis ger postverkið nú tað sama. Hendan menningin er farin fram í fleiri øðrum norðurlondum. Millum annað í Danmark eru 30-40.000 avgreiðslur farnar fram gjøgnum posttøkur har, seinastu tvey árini.

Ein hin hentasti møguleikin við posttøkuni er, at nú verður gjørligt at avgreiða postørindi eftir at posthúsið er stongt. Tað liggur eisini í framtíðini at slíkar posttøkur verða settar upp kring landið, og ikki einans á posthúsum.

### Lætt at brúka

Eiler Haraldsen var fyrsti persónur at royna nýggj posttøkuna – og hann lat væl at. – Tað er als ikki truprult at finna útav, vegleiðing er góð á posttøkuni, lat hann at. Men legði afturat at tað ræður eisini um hjá kundanum, at biða tólið um vegleiðing, og hetta er nakað, ið vanliga fá nýta. Eitt hitt besta við hesum, var at nú er møguligt at fara á posthús eftir arbeiðstíð, og hetta er nakað, ið nógv hava tørv á. Somuleiðis er tað øgiliga gott at sleppa undan bíðirøðum, ið ofta er inni á posthúsunum, greiddi hann frá.

Men eitt hevði hann at finnast á, tað var at eingir prikkar vóru til blindskrift, ið nú vera at síggja á fleiri og fleiri slíkum tólum. Men hetta hevði hann nevnt fyri postverkinum, so tað burdi komið í rætt lag nakað skjótt. Somuleiðis krevst eitt gjaldskort til avgreiðslu, ikki ber til at nýta girokonto.

Fyrstu tíðina væntaði hann at fleiri starvsfólk verða noydd at hjálpa kundum í gongd, men sum sagt, ræður tað í fyrstu atløgu um at seta seg inn í skipanina. Hetta tekur óivað ójavnt langa venjing, alt eftir fólki, men einhvør kann læra at nýta posttøkuna.

## Fleiri í Norðurlondum

Bent Vistisen umboðaði donsku fyritøkuna aCon, ið er veitari av posttøkuni. Hann greiddi frá at aCon hevur framleitt og veitt posttøkur í hópatali, millum annað seks til Hollands, fýra til Íslands, fýra til Noregs, heilar sjey kring um í Danmark og fýra eru nú bílagdar til Føroya.

- Fyrsta posttøkan var sett upp í Danmark í septembur 2006, og longu eru 30-40.000 avgreiðslur farnar fram gjøgnum hana, so longu eru heilt nógv, ið gagnnýta hesa tøknina, segði hann frá. Í Danmark eru tær settar upp á posthúsum, bæði inni og úti, og eisini aðra staðni. Hann ivaðist ikki í, at ein hin besti hentleikin var, at nú var møguligt hjá øllum at senda brøv og pakkar uttanfyri vanligu arbeiðstíðirnar.

Næsta ætlanin hjá fyritøkuni innan hetta sama øki, er, at menna eina skipan, ið fer at gera tað gjørligt at avheinta pakkar eftir vanligu tíðirnar. Ein kassaskipan verður gjørd, sum pakkarnir vera lagdir í. Er ein pakki til tín, fært tú eitt sms við einum tali og einum loyniorði, ið tú kanst nýta í kassaskipanini at fáa tín pakka útflýggjaðan.

# – Næsta stigið á leiðini

SAMRØÐA

*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Heri Kjærbo, marknaðarleiðari og Svannbjørg Manai, menningarstjóri á Postverk Føroya, vóru sera jalig og spent um hetta átak.

– Hesin dagur er ein nýggjur kapittul í søguni hjá postverkinum og hjá samfelagnum, segði Heri Kjærbo, - hetta er næsta stigið á leiðini móti einum nýmótans postverki.

Tey vera bæði har í dag, og koma at síggja fólk nýta posttøkuna og vegleiða. Annars er ætlanin at hava fólk, heilt fram til jóla, at vegleiða kundar, ið ikki eru vanir við slíka avgreiðslu. Svannbjørg Manai væntaði at fleiri og fleiri fólk fóru at taka undir við hesum og nýta posttøkuna, - Tað er tað sama sum bankanir gjørdu við sjálvtøkunum og tað sama sum sæst í eittnú Kastrup floghavn, har sjálv-check-in avgreiðslur eru settar upp. Í fyrstu atløgu er nú týdningarmikið hjá postverkinum at kunna kundarnar um møguleikarnar og hentleikarnar við posttøkuni. Bæði vóru samd um, at ein hin størsti fyrimunurin var, at nú var gjørligt at avgreiða post-ørindi eftir vanligu avgreiðslutíðirnar hjá posthúsunum, lætt, skjótt og ómakaleyst.

Hóast tað kann tykjast óneyðugt, mettu tey, at tað var rætt at byrja hetta átak á Føroya størsta posthúsi, nevniliga á Óðinshædd. Her vitja flest fólk og tí, læra fleiri og fleiri at nýta hana, greiddi Heri Kjærbo frá, - Men hetta er bara fyrsta stigið, átakið kemur at víðka seg. Hann greiddi frá at ætlanin er at seta fleiri upp, nógva staðni kring landið. Møguliga hjá øðrum, møguliga fer postverkið sjálvt at útvega sær høli til tess. – Postverkið skal geva meining fyri kundan og samfelagið. Vit fara út til kundan við okkara tænastum.



*Fyriskipararnir av átakinum og umboð fyri veitaran (longst til høgru)*